Skála-KÍ 0-2 (0-0):

# KÍ gjørdi pliktarbeiði á Skála

**Kartin Joensen í KÍ málinum stórbjargaði, tá ið Skála fram ímóti dystarenda var komið ígjøgnum ikki sannførandi miðverjuna**

SKÁLA–KÍ
*Jóannes Hansen*

KÍ slapp tíðliga seinnapartin sunnudagin av Skála við øllum stigunum. Harvið høvdu teir fingið hópin størri úrtøku, enn teir fingu í fjør, tá ið teir fyri fyrstu ferð vóru á Skála og spældu landskappingardyst. Ta ferðina var úrslitið 2–2. Tí er einki at siga til, at klaksvíkingar vóru hjartans fegnir. Serliga tá havt verður í huga, at heildaravrikið hjá KÍ yvirhøvur einki var at rópa hurrá fyri, tá ið havt verður í huga, at tað var toppur ímóti botni.

– Leikliga avrikið kunnu vit á ongan hátt vera nøgdir við. Í álopspartinum hekk tað ikki nóg væl saman, tí vit vóru ov seinir fram. Ætlanin var ikki, at Aleksander Djordjevic skuldi vera so einsamallur har frammi. Men serliga í borðunum vóru vit ikki nóg skjótir fram at stuðla.

Hetta segði KÍ venjarin, Jan Joensen, eftir søta sigurin. Venjarin var á vøllinum síðsta partin av seinna umfarinum, tí Allan Joensen noyddist at taka seg burturúr. Verjuspælið helt KÍ venjarin hevði verið syndarligt:

– Vit vóru sera illa skipaðir í miðverjuni. Um vit skulu hugsa um at vinna uppgerðirnar ímóti hinum liðunum, sum eru í ovara enda, so fer tað ikki at bera til at gera mistøk av tí slagnum, sum hesa ferð bóru stórar møguleikar við sær til mótstøðuliðið. Tíbetur var Kartin Joensen stinnur í málinum. Serliga var tað avgerandi, tá ið hann í 2. hálvleiki var einsamallur við Jónhardi Frederiksberg og stórbjargaði. Vit hava fleiri ferðir fyrr í ár sæð, at hann er stinnur í ein ímóti einum støðum. Um hann ikki hevði bjargað í hasi støðuni, og Skála hevði havt javnað, so ivist eg í, um vit høvdu megnað at vunnið. Tað gjørdu vit so, og nú mugu vit gloyma, hvussu vit fingu stigini og fokusera upp á næstu uppgávuna, sum verður í Gundadali ímóti B36. Ofta vísir tað seg, sum um spælararnir eru meiri uppsettir til torføru uppgávurnar, enn teir eru til tær uppgávurnar, sum á pappírinum tykjast lættar. Onnur feløg hava longu havt trupulleikar her á Skála, og eg rokni við, at onnur enn vit fara at kenna tað torført at vinna her, heldur Jan Joensen.

Í miðverjuni plagar Ove Nysted at vera væl meiri sannførandi, enn hann var hesa ferð. Johan Nielsen tóktist hava givið sínum monnum boð um, at teir skuldu ikki leggja høgar sendingar í KÍ brotsteigin. Í staðin royndi Skála, sum heilt tíðliga var fyri tí óhappi at missa Svein Justinussen av miðvøllinum, at spæla flatt, og at hava lættbeintu Jónhard Frederiksberg og Alexander Johansen hvør



*Tað stóð nógv á hjá KÍ, men fram móti dystarenda fekk Hjalgrím Elttør punkterað Skála og harvið hildið klaksvíkingum fast í oddinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

sínu megin stóra KÍ miðverjan, sum fleiri ferðir var um ein háls, men í síðstu løtu fekk hjálp frá Sámali Eyðfinn Akursmørk.

### Lyklaspælarar gjørdu málini

Í fyrra umfarinum vóru uppløgdu støðurnar ikki so nógvar. Fimm minuttir undan steðginum var Alexander Johansen blankur, men hann kiksaði, og í næsta álopinum var Aleksander Djordjevic einsamallur ígjøgnum, men skotið fór við síðuna av.

Hjá KÍ vóru Atli Danielsen og Hjalgrím Elttør mest sannførandi. Atli á miðvallarplássinum í høgru, og Hjalgrím í útgangsstøðuni á mest framrættaða miðvallarplássinum, hagani hann arbeiddi nógv bæði aftureftir og frameftir og út í borðini.

Teir báðir skoraðu málini í 2. hálvleiki, tá ið veteranurin John Ryan var á miðvøllinum í vinstru. Atli fekk tað fyrra, tá ið seinna umfarið var stórar tíggju minuttir gamalt. Uppskriftin líktist nógv henni, sum varð brúkt, tá ið Atli skoraði sigursmálið í Gøtu. Hjalgrím Elttør spældi upp á tvørs, og tá ið Atli var komin inn um brotsteigarsamankomingina í høgru, potaði hann hegnisliga framvið málverjanum og dygst inn við handara stólpanum.

Hjalgrím Elttør hevði verið einsamallur eina ferð, áðrenn hann fekk málið. Fyrru ferðina fór bólturin úr vinstru dygst fram við handara stólpanum. Ímóti dystarenda flutti Skála nógv fólk langt fram. Hjalgrím fekk fatur á langari sending úr KÍ brotsteiginum, hann dugdi at skapa sær pláss frammanfyri mótstøðuverjuna, og tá ið málverjin kom út ímóti, var landsliðsmaðurin nóg kaldur at lyfta upp um hann og í málið.

Í góðverðinum lætnaði hjá klaksvíkingunum á og kring vøllin. Skálamenn noyddust enn eina ferð at ásanna, at teir eru stigaleysir, og at teir framvegis bara hava fingið málið, sum Bartal Eliasen stútaði fyri teir í Gøtu fyri einum mánað síðani!

### Skála–KÍ 0–2 (0–0)

0–1: Atli Danielsen 56.
0–2: Hjalgrím Elttør 89.
**Skála:** Eugen Voda – Agnar Højgaard, Pauli G. Hansen, Dusan Jaic, Pétur Geir Svavarsson – Hanus Thorleifsson, Aleksandar Jovevic, Sveinur Justinussen (Bárður R. Joensen, 12./ Teitur Joensen, 81.), Bogi Gregersen – Jónhard Frederiksberg, Alexander Johansen
**Gult kort:** Agnar Højgaard
**KÍ:** Kartin Joensen – Harley Bertholdsen, Ove Nysted, Sámal Eyðfinn Akursmørk, Símun Joensen – Atli Danielsen, Allan Joensen (Jan Joensen, 73.), Hjalgrím Elttør, Leon Bjartalíð (Eyðun Klakstein, 64.), Erling Fles (John Ryan, 46.) – Aleksander Djordjevic
**Gult kort:** einki






NSÍ-B68 1-1 (0-1):

# Sátt og semja millum grannarnar



*Báðir partar løgdu nógv arbeiði í, men stigini máttu teir kortini býta sínamillum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**At flestu málini verða skorað eftir hornaspørk og fríspørk varð undirstrikað, tá ið grannarnir á Skálafjørðinum løgdu nógv arbeiði í, men ikki megnaðu at spæla seg til upplagdar møguleikar**

NSÍ–B68
*Jóannes Hansen*

Í fínum fótbóltslíkindum leygarkvøldið býttu grannarnir á skinninum við Løkin í Runavík. Bæði liðini hava málverjar, sum stóðu seg sera væl.

B68 málverjin, Albert Sævarson, var orsaka av skaða í tjúkkanum næstan ikki gonguførur hóskvøldið. Tí var Mortan Hansen ikki við næstbesta liðnum á Argjum fríggjakvøldið. Tað varð roknað við, at hann skuldi verja málið í 1. deild leygardagin. Men teir megnaðu at pjøssa so mikið um Albert Sævarson, at hann leygarkvøldið var førur fyri at vísa sannførandi avrik. Ikki tí at hann hevði so nógv at gera millum stólparnar, men heldur tí at hann aftur hesa ferð var tryggleikin sjálvur, tá ið hann fór út í brotsteigin og pilkaði bóltin til sín, eftir nógvu høgu innleggini úr borðunum, og tí hann vísti stórt hegni og dirvi uttanfyri brotsteigin, tá ið tað onkra ferðina var neyðugt hjá honum at vera eyka stoppari.

### B68 átti fimm korter

Burtursæð frá, tá ið teir fram ímóti miðjum seinna umfarinum javnaðu til 1–1, hevði NSÍ bara eina rættuliga roynd ímóti B68 málinum. Sjúrður Jacobsen royndi úti frá, og málverjin bjargaði.

Burtursæð frá fyrsta stóra korterinum var NSÍ omaná, og tað var avgjørt ikki óvæntað, at teir javnaðu. Eftir at B68 var komið framum, hevði NSÍ bóltin nógv størra partin av tíðini. Teir vóru skjótari og sterkari í nærdystunum, og tað gekk meiri fyri seg á B68 válinum enn hinumegin. Í 2. hálvleiki royndi NSÍ – teir saknaðu skadda Kára Hansen á miðvøllinum og góvu eftir steðgin Rúna Rasmussen møguleikan, meðan Christian Høgni fór í álopið – serliga at spæla seg ígjøgnum í vinstra borði, har tað eydnaðist betri hjá Sjúrði Jacobsen og Jónstein Petersen, enn tað hevði gjørt í fyrra umfarinum, tá ið John Heri Dam á høgra B68 vongverja tipti væl fyri spurtroyndunum hjá Jónsteini. Krosssendingarnar í luftini og eftir jørðini vóru nógvar, men undir B68 málinum formáddu fremstu heimamenninir sær lítið ímóti B68 verjuni, sum var sera stinn.

Einasta NSÍ málið var úrslit av frísparksstøðu. Brynjolvur Nielsen sendi innfyri av baklinjuni og seytjan metrar frá málstólpanum, Ian Højgaard royndi seg við skoti, sum tók í økslina á Øssuri Hansen og í høvdið á Messiasi, áðrenn bólturin sigldi inn í málhornið. Málið sá vakurt út, men tað var rættuliga tilvildarligt. Messias, sum hevur verið á Toftum í trý ár, men í ár fall fyri avgerðina hjá B68 um ikki at fara so langt eftir arbeiðsmegi, stórfegnaðist saman við liðfeløgunum.

Eftir NSÍ málið lá í luftini, at talan kundi gerast um heimasigur. Áræðið vaks, og trýstið á B68 verjuna øktist eina løtu, men tað knípti við flótandi fótbóltsspælinum, B68 verjan stóð stinn sum bergið, og sum tað leið fram ímóti dystarenda tóktust báðir partar at sætta sær við, at tað skuldi býtast púra javnt.

### Løgdu fyri sum óløgi

Toftamenn løgdu rættuliga bragdliga fyri. Bogi Petersen og Fróði Benjaminsen vóru ofta heilt frammi í álopinum at hjálpa Súna Fríða Johannesen, soleiðis at útgangsstøðan minti ikki sørt um 3–4–3. Ferðin hjá B68 var høg, teir vunnu nærdystirnar, og tað vóru teir, sum vóru mest nærgangandi.

Fróði Benjaminsen hevði úr vinstru góða roynd, sum streyk framvið stólparótini, og sera væl upplagdi Øssur Jacobsen, sum í steðginum noyddist at taka seg aftur við skaða, sendi langskotið ímóti málinum, sum í síðsta enda bar leiðslumálið við sær. Jens Martin Knudsen vippaði bóltin upp um tvørtræið til horna. Í øllum B68 hornasparksstøðunum tóktist vandin stórur, tí Hans Fróði Hansen, Dánial Hansen og Fróði Benjaminsen løgdu trýst á. Eitt stórt korter var farið, tá ið hetta hornasparksinnleggið, eftir at hava ferðast á fleiri høvdum, datt fyri føturnar á Súna Fríða Johannesen, sum úr tveimum metrum sendi upp í nettakið.

Eftir tað linkaði ferðin hjá B68. Teir runnu nógv aftaná, og landsliðsmiðvøllurin megnaði ikki at seta dám á við fótbóltsspæli. Men í verjuni vóru Dánial, Hans Fróði og Arnbjørn knassar, og harvið var tað.

Áskoðararnir minnast neyvan uppgerðina fyri flótandi spæl. Men intensiteturin var stórur, nærdystirnir nógvir og stevnulagið gott. So tóktist tað vera harvið, at málmøguleikarnir trutu, og at tað bara eydnaðist at skora eftir fastar støður.

### Dysturin í tølkum

**NSÍ–B68 1–1 (0–1)**
0–1: Súni Fríði Johannesen 17.
1–1: Messias Perreira 63.
**NSÍ:** Jens Martin Knudsen – Brynjolvur Nielsen, Óli Hansen, Messias Perreira, Sjúrður Jacobsen – Gert Langgaard (Andy Olsen, 87.), Ian Højgaard, Christian Høgni Jacobsen (Jústinus R. Hansen, 53.), Jónstein Petersen – Sonni L. Petersen (Rúni Rasmussen, 46.), Helgi L. Petersen
**Gult kort:** Jónstein Petersen 36.
**B68:** Albert Sævarson – Dánial Hansen, Hans Fróði Hansen, Arnbjørn Danielsen – John Heri Dam, Bogi Petersen (Kristian Anton Andreasen, 72.), Jann Ingi Petersen, Fróði Benjaminsen, Øssur Hansen, Øssur Jacobsen (Jóhan Petur Poulsen, 46.) – Súni Fríði Johannesen (Mannbjørn Nesá, 87.)
**Gult kort:** Mannbjørn Nesá 90.

# Hetja og pápi



*Hóast Beinta gjørdist stórasystir um vikuskiftið, so hevði Bárður Johannesen kortini orku at verja HB-málið sunnudagin. Og tað gjørdi hann eisini til reint UG*

**Bert lítið samdøgur eftir at verða blivin pápi, stóð Bárður Johannesen ein branddyst fyri HB**

FÓTBÓLTSPÁPI
*Jákup Mørk*

- Í málinum hjá HB, og ivaleyst ein tann feskasti pápin í Føroyum, Bárður Johannesen.

Stadion-speakarin í Gundadali kundi sunnudagin undan dystinum siga frá eydnuríku støðuni hjá HB-málverjanum, nú hann var blivi pápi fyri aðru ferð.

Hesa ferð var tað ein drongur, sum sá dagins ljós, og tó at hetta hendi leygarkvøldið, so var Bárður til reiðar at taka eitt tørn fyri HB sunnudagin. Meðan hann soleiðis stóð og hitaði upp, vóru orðini, at tað hevði gingið bæði skjótt og væl, og at hann var heima longu um ellivu-tíðina, so tað helt hann ikki vera nakran trupulleika.

Og hann fekk eisini sína løn fyri hetta. Við trimum týðandi bjargingum – harav einari úr ellivu metrum – helt hann HB inni í dystinum fyrstu løtuna, og av áskoðaraplássunum var hann valdur dagsins maður.

So tað mundi vera góðari samvitsku, at hann eftir dystin fór út á sjúkrahúsið at vitja sonin, ið sum vera man framvegis var hjá mammuni.